# EM-asfalt úr Søldarfirði undir at gera asfalt

**Stjórin í EM-asfalti, Edvard Højgaard Mikkelsen, vil tó ikki vera við, at teir fara at kappast við landsverkfrøðingin. –Tann kappingin er ómøgulig. Vit fara heldur at leggja okkum eftir at nøkta privata og kommunala tørvin, sigur hann. Gongur alt sum tað skal, fara teir undir at selja asfalt í summar**

VINNULÍVIÐ
*Eydna Skaale*



Í næstum verður landsverkfrøðingurin, sum annars hevur verið einaráðandi á økinum, ikki longur einasta virki, sum ger asfalt. EM-asfalt úr Søldafirði fer í næstum undir fyrireikingarnarar til at gera asfalt, og teir vóna at kunna byrja søluna í juli.

Edvard Højgaard Mikkelsen, stjóri í EM-asfalt, vil tó ikki siga, at teir ætla sær at kappast við Landsverkfrøðingin.

– Landsverkfrøðingurin er sjálvforsýnandi, tvs, at hann fyrst og fremst ger asfalt til egna nýtslu. Tað hevur verið nógv asfaltering hjá okkum í seinastuni, og tað hevur víst seg at verið torført at fingið røttu asfaltmongdina frá landsverkfrøðinginum, serliga tá talan hevur verið um størri arbeiði. Hetta tí teir hava úr at gera við at framleiða til sín sjálvs, sigur Edvard Højgaard Mikkelsen. Hann sigur víðari, at ein annar vansi við at vera bundin at landsverkfrøðinginum er, at teir hava eina langa summarfrítíð.

– Summarið er besta tíðin at asfaltera í, tí tá er veðrið best. Men landsverkfrøðingurin hevur feriu frá fyrst í juli líka til hálvan august. Tá kundu vit fingið nógv arbeiði frá hondini, men tá liggur mestsum stilt, sigur hann. –Tað hevur verið ringt ikki at fingið arbeitt í bestu líkindum, tí eitt annað felag er í feriu, sigur Edvard. Hann sigur eisini, at apríl máni oftani hevur nógvar góðar sólskinsdagar, men landsverkfrøðingurin byrjar ikki framleiðsluna fyrr enn í mei, so tá fáa teir heldur einki gjørt.

– Av tí at landsverkfrøðingurin hevur nokk at gera við eginframleiðslu, so hava vit privatu virkir viðhvørt kent okkum, sum vit líkasum "forstýraðu" teir í teirra arbeiði. Vit gjørdu tað trupult, tí teir vórðu noyddir at blanda fleiri sløg. Ikki tí, samstarvið hevur verið fyrimyndarligt, og vit hava havt eina góða avtalu við landsverkfrøðingin. Tað gongur bara ikki í longdini, sigur hann.

Hann greiðir frá, at teir onkuntíð hava keypt asfalt úr Norra fyri at fáa arbeitt um summarið, men at tað bestemt ikki er ein haldbar loysn. – Tú ert noyddur at satsa, um tú keypir asfalt uttanlands. Veðrið her heima er jú ógvuliga svikaligt, og er veðrið ringt, tá asfaltið kemur, fært tú ikki gjørt tað, tú ætlaði.

Leysasøgur hava gingið um, at Tórshavnar kommuna skal hava tryggjað EM-asfalti alt arbeiðið í Havnini og sett pening í virkið, men hetta noktar Edvard blankt. – Vit hava einki við Tórshavnar kommunu at gera, uttan tað, at vit leiga eitt øki inni á Sundi, har virki skal vera.

Edvard heldur grundarlag vera fyri einum virki afturat, sum framleiðir asfalt. – Tað er ein stórur tørvur, sum vit fara at royna at nøkta. Nógv privat og kommunalt arbeiði er at gera. Hevði eg ikki hildið eina vinnu verið í tí, hevði eg ikki farið undir hetta, sigur hann.

Edvard Højgaard Mikkelsen sigur, at teir fara undir fundamentini inni á Sundi í næstu viku, og at teir vóna, um alt gongur væl, at verða klárir at selja asfalt fyrst í juni.

– Nú tosa teir so nógv um privatisering og teir útbjóða bæði koyring og grevstur. Kanska okkurt fellur í okkara lut, so vit fáa ein bita av tí køkuni eisini, endar Edvard Højgaard Mikkelsen við at siga.

## Prísur og góðska avgera hvar fólk keypa

VINNULÍVIÐ
*Eydna Skaale*

Hjá landsverkfrøðinginum taka teir tíðindini um nýggja asfaltverkið ógvuliga róligt.

– Tað er púra hopleyst at vita um tað fer at ávirka okkum í nakran mun. Tað má tíðin bara vísa, verður sagt.

– Prísur, góðska og tænasta annars gera av, hvar fólk velja at keypa. Verða teir betri og bíligari enn vit, so fer tað allarhelst at merkjast, tað má man rokna við, siga teir hjá landsverkfrøðinginum.

Teir siga seg annars megna at nøkta tørvin sum er. Bæði til egin-nýtslu og til arbeiði hjá teimum privatu.

# Føroysku KT-fyritøkurnar longri tíðarfreist enn tær útlendsku

**Hans Pauli Strøm sigur at málið um talgildaða heilsuverkið og føroysku KT-fyritøkurnar er blivið uppblást til nakað nógv meiri, enn tað í veruleikanum er.**

TALGILDING AV HEILSUVERKINUM
**Eydna Skaale**



*Hans Pauli Strøm sigur at nógvir av upplýsingunum, sum eru komnir fram um málið, eru skeivir*

Fyri einum ári síðan var av fyrstan tíð talan um at fara undir at talgilda heilsuverkið, tvs at gera eina elektriska sjúklingaskrá.

Tað varð farið undir at gera forkanningar til arbeiðið, m.a. varð hugt at hvør ið føroyski tørvurin var, hvørjar trupulleikar nýggja skipanin skuldi loysa og hvørjir møguleikarnir fyri eini slíkari skipan vóru í Føroyum.

Hugt var serliga at heilsuverkunum í norðurlondunum, sum longu eru talgildað, tí heilsuverkini í har eru bygd eftir sama leisti sum okkara er.

Hugt var at teimum sum fungeraðu væl og teimum sum veruliga høvdu brent seg av nýggju skipanini.

– Tað vísti seg, at tey, sum høvdu uppfunnið eina serliga skipan, skræddaraseymaða til egnan tørv, vóru tey sum komu illa fyri, sigur Hans Pauli Strøm, landstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

– Har sum ein standardskipan varð sett í verk, vísti tað seg harafturímóti at fungera væl. Nógvir fyrimunir eru við standardskipanini. Tú fært trygd fyri at hon virkar, sum hon skal, tí hon er tikin í brúk, verður dagliga nýtt og hevur longu stóran brúkaraskara í grannalondunum. Haraftur-at, verður hon dagførd við jøvnum millumbilum, sigur landsstýrismaðurin.

Hann greiðir frá, at forkanningarnar vóru lidnar í november í fjør. So varð farið undir at finna veitarar til skipanina.

– Leitað var eftir fyritøkum, sum kundu levera hesa standardskipanina, sum varð mett at vera tann besta. Tað vístu seg at vera 8 fyritøkur, sum kundu veita hesa skipanina. Tær vóru allar 8 útlendskar, sigur Hans Pauli Strøm.

Tær fingu so tilboð um at vera við í sonevndu prækvalifikatiónini, tvs at fyritøkurinar fingu møguleika at bjóða seg fram og leggja fram um sín kunnleika og sínar dygdir innan økið, og grundgeva hví tær vóru best egnaðar til arbeiðið. Hetta fingu tær 14 dagar til. Út av teimum 8, sum vóru við í præ-kvalifikatiónini, vórðu 3 valdar út.

– So kom valið, sum legði arbeiðið stilt eina tíð. Nýtt landstýrið var valt og tað tók mær eisini eina tíð at seta meg inn í øll málini, harímillum hetta, sigur Hans Pauli Strøm.

– Tað var ikki fyrr enn tá, at tær føroysku KT-fyritøkurnar byrjaðu at sýna áhuga fyri arbeiðnum. Tær gjørdu vart við, at tær eisini vildu hava ein møguleika at bjóða seg fram. Vit høvdu ein fund við KT-felagið og vit diskuteraðu tað eisini í samgonguni, greiðir Hans Pauli frá.

Endin varð, at føroysku fyritøkurnar fingu møguleika at præ-kvalifisera seg eisini. Tær fingu tíðina frá 1. til 23. apríl at arbeiða í. Orsakað av páskavikuni fingu tær sostatt 1 viku longur enn útlendsku feløgini.

– Sum tíðin leið ímóti freistini, gjørdu tey føroysku feløgini vart við, at tíðin kanska var nakað stutt. So tá útsettu vit freistina til 7 mei. Føroysku virkini fingu sostatt 5 vikur, har útlendsku bara fingu 2, sigur Hans Pauli.

Hann sigur, at freistin til útbjóðingina, sum uppruna-liga var 30. juni, eisini varð flutt fram. Nú er hon ikki fyrr enn um hálvan juli.

– Nógvir av upplýsningunum, sum hava verið frammi um málið, eru beinleiðis skeivir, sigur landsstýrismaðurin.

– Føroysku fyritøkurnar vóru ikki við frá byrjan, tí vilji var at seta áðurnevndu útlendsku standardskipan í verk. Søkt varð uttanlands, tí har vóru fyritøkur, sum frammanundan framleiddu hesa skipanina, sigur hann.

Verða føroysku fyritøkurnar valdar eftir præ-kvalifikatiónina, kunnu tær geva tilboð um arbeiðið antin einsamallar, saman við aðrari føroyskari fyritøku ella saman við útlendskari fyritøku.

Hans Pauli Strøm heldur tað vera púra burturvið at lagt hevur verið eftir núverandi landstýrið, viðvíkjandi handfaring av málinum.

– Vit eru akkurát byrjaðir at arbeiða. Bill Justinussen valdi at gera, sum hann gjørdi, og tað haldi eg, at hann hevur grundgivið væl fyri. Vit hava so valt at broyta tað, so føroysku virkini fáa verið við, og nú verða vit kritiseraðir, sigur Hans Pauli.

– Framyvir haldi eg annars avgjørt, at føroyska KT-vinnan og føroyska vinnulívið sum heild, skal takast uppí verkætlanir sum hesa. Sjálvsagt skulu teir vera við í arbeiði sum vit gjalda og stýra sjálvir. Heilt avgjørt, endar hann við at siga.

Málið um peningajáttan til at talgilda heilsuverkið verður annars lagt fram fyri tingið í næstu viku. Viðger skuldi havt verið í hesi vikuni, men landstýrismaðurin tók málið aftur, inntil hann var heilt vísur í, at semja var um málið.

Vikuskifti

Nr. 73 • leygardagur • 17. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Tróndur Enni - ein fjøltáttaður tónleikari

Vit hitt evnaríka tónleikaran í komandi heimi hansara.



Lesið síðu 9



*– Clapton hevur verið nakað heilt serligt fyri meg. Eg vaks næstan upp við tónleikinum hjá honum, sigur Gissur Patursson, sum er ein av nógvum føroyingum, sum fara á konsert hjá gittarspælaranum í kvøld*

# Seigligar hendur í Parkini

Eini hálvthundrað føroyingar fóru í gjár av landinum, tí teir skuldu á konsert við livandi gittarlegundi, Eric Clapton. Slowhand hevur bara eina konsert í Norðurlondum á hesari konsertferðini, og hon er í Keypmannhavn

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Eric Clapton er ein livandi leganda. Gittarspælarin, sum hevur gjørt um seg í bólkum og sum solistur, savnar framvegis eina ørgrynnu av fólkum, allastaðni hann spælir.

Í kvøld hevur Slowhand, sum hann eisini verður róptur, konsert í Parkini í Keypmannahavn, og har er sum vera man útselt til framførsluna.

Millum teir mongu áhoyrararnar verða eisini nógvir føroyingar, sum í gjár fóru við flogfari av landinum.

– Clapton er ein legenda, so vit nýta hetta høvi til at sleppa á konsert hjá honum. Hetta er tað nærmasta, hann kemur, sigur Gissur Patursson, sum er ein av teimum, sum fer til konsertina.

Framførslan í Keypmannahavn er partur av eini heimskonsertferð, sum byrjaði í Japan í november mánaði í fjør, og hetta er einasta konsert, hann hevur í Norðurlondum á hesum sinni.

### 40 ár í tónleiki

Eric Clapton hevur verið virkin sum tónleikari í eini 40 ár. Tá ið hann miðskeiðis í sjeytiárunum fóru undir sínar yrkisleið sum solistur, varð hann longu kendur og virdur sum ein av stóru rockgittaristunum.

Hann spældi í bólkum The Yarbirds, Cream og Blind Faith.

Í 1974 kom fyrsta sologløgan hjá honum, og hon reyk upp á tónatindarnar, og sangurin »I shot the Sheriff« gjørdist eitt stórt hitt kring allan heimin.

Clapton hevði rættiligan undanvind í sjeytiárunum, men í áttatiárunum gekk eitt sindur upp og niður hjá honum, men tá ið hann í 1989 kom við út´gavuni Journeyman var hann aftur í stórformi.

Í mars mánaði í 1991 doyði fýra ára gamli sonur hansara, og aftaná hevði Clapton tað trupult, men hann hevði óvæntað eydnu við sær í tónleikinum. Meðan hann syrgdi deyðan hjá soninum, gav hann út eina konsertfløgu og skrivaði tónleik til ein film. Ein av sangunum, hann skrivaði, var Tears in Heaven, sum gjørdist eitt ordans hitt.

Síðani hevur Clapton givið nógvan tónleik út, og hann er í hesum døgum aktuellur við eini útgávu, har hann spælir sangir hjá bluestónleikaranum Robert Johnson – Me and Mr. Johnsson kallast útgávan.

### Tann størsti

Konsertin í Parkini í kvøld verður undir øðrvísi umstøðum, enn konsertir har vanliga verða hildnar. Pallurin verður mitt inni á vøllinum, takið verður drigið út yvir, og so sleppur bert helmingurin av tí, sum kundi rúmast í Parkini, til konsertina. Endamálið við hesum er at gera eina tætta og hugnalig konsert, hóast fleiri túsund fólk rúmast inni.

– Clapton hevur verið nakað heilt serligt fyri meg. Eg vaks næstan upp við tónleikinum hjá honum, og sum 14 ára gamal minnist eg, at eg fyri fyrstu ferð seldi eina plátu hjá honum, sigur Gissur Patursson, sum framvegis selir plátur hjá Clapton í fløguhandlinum hjá sær.

– Eg eri nervøs fyri at fara á konsertina, tí hetta er tónleikur, sum gongur mær sera nær. Sanginir koma so tætt, at eg veit ikki, hvussu eg fari at reagera, tá ið eg hoyri hann spæla teir live, sigur hann.